# Fosturtøkulógin endurskoðast

DÁVID ISFELD



Í kjalarvørrinum á førda politikkinum tey síðstu árini, har mangar yvirtøkur eru framdar av ymiskum politiskum málsøkjum, er eisini komið kjak í um dagføring av ymiskum gomlum løgum; eitt nú rúsdrekkalógin og 266b. Eisini hevur endurskoðan av lógini um fosturtøku verið upp á tal.

Í farnu viku hava vit júst hoyrt, at vit hava eitt met høgt tal av mammum, sum eru tannáringar. Hetta merkir møguliga, at tað ikki verða framdar so nógvar fosturtøkur, sum tað hevur verið. Tað kann sjálvsagt eisini bara merkja, at fleiri tannáringar ikki ansa sær so væl, sum teir hava gjørt. Men uttan mun til orsøkina av methøgum tannáringamammum, er tíðin komin til endurskoðan av fosturtøkulógini.

Av tí at fosturtøka er so persónligt og so grundleggjandi í okkara lívi, meini eg tað vera alneyðugt, at ein endurskoðan av fosturtøkulógini tekur støði í ynskinum og etisku sannføringini hjá Føroya fólki - møguliga við eini fólkaatkvøðu. Áðrenn ein slík lógarbroyting verður framd, er tað sera týdningarmikið, at kjakið verður greitt og reiðiligt, og at farið verður í dýpdina.

Til frama fyri einum vala kjaki, umhugsni og støðutakan, havi eg skrivað eina greinarøð (3 greinir) um hetta evni, við denti á avgerð og árin hjá tí einstaka persóninum - serstakliga kvinnuni - tí, sum áður sagt, er hetta sera persónligt. Greinirnar eru sostatt skrivaðar til tað meiniga fólkið - sjálvsagt eisini til politikararnar, men sum privat persónar fyrst av øllum og síðan sum politikarar.

Hetta er eitt evni, eg havi tosað við nógv fólk um tey síðstu árini, og er tískil ikki bert nakað eg havi hála upp úr hattinum síðstu dagarnar. Greinirnar fara at snúgva seg um tankar viðvíkjandi fosturtøku, sum eg, eftir bestu samvitsku og sannføring, meini er ein fyrilitarlig og virðilig viðgerð av einum evni, sum er av slíkum álvarsamum og etiskum slag.

Ætlanin er at fáa greinirnar í bløðini eina í senn og dag um dag. Eg veit, at hetta er eitt eldfimt evni, men eg vóni, at sakleiki, umhugsni, vísdómur og góður fólkaskikkur fer at mynda hetta kjak, sum er so umráðandi; annars er tað bert burturspilt tíð, orka og ómakur.

# Eldrapolitikkur?

SIGRÚN MOHR



Í hesari øldini hava verið trý løgtingsval. Minnist meg rætt, vóru tey eldru hjartamálið hjá mestsum øllum teimum flokkum, sum stillaðu upp.

Hóast nøkur búpláss eru fingin til vega til teirra, ið ikki klára seg sjálv longur, er langt á mál, um vit skeita í Visjón 2015 um eldrapolitikk. Hava okkara politikkarar sett sær onnur mál innan hetta økið, ella verður bara farið fram eftir fummum? Verður mesta orkan brúkt til at sløkkja eldar við heldur enn at fyribyrgja?

Fleiri dagtilhald hava sæð dagsins ljós kring landið seinastu árini. Hetta er ein framúr íløga fyri tey, ið fáa gagn av hesum tilboði.

Nú frættist, at landið - ið varðar av eldraøkinum - hevur ætlanir um at skerja játtanina til Almannastovuna við fýra milliónum. Vandi verður tá fyri, at fleiri dagtilhald helst mugu lata aftur.

Vita tit, ið taka hesa avgerð, at skipað dagtilhald fyri eldri fólk fyribyrgir frábyrging og einsemi og heldur viðlíka tað sálarliga, likamliga og sosiala virknið? Eisini er vert at nevna, at kanningar aðrastaðni hava staðfest, at slík tilboð eru røktarheimsfyribyrgjandi og á tann hátt góð fyri landsbúskapin!!

Mæli tí til, at tit lata verandi dagtilhald fáa frið, og at dentur verður lagdur á fáa fleiri dagtilhald. Vit missa meiri fyri minni við tílíkum landspolitikki. Hetta er eisini lítið virðiligt móti teimum, sum hava slóðað undan.

Loyvi mær at spyrja, um tit, sum stýra í dag, vilja liva undir somu korum, sum tit nú bjóða okkara eldru?

# Viðmerking til J. W. Joensen

JASPUR PETERSEN
Kommunulæknafelag Føroya

Ein stutt viðmerking til málið nevnt í brævi í fjølmiðlunum frá J. W. Joensen 10.11.2008 um Klaksvíkar Sjúkrahús og Læknavaktina.

Fólk ringja um neyðugt til 1870 tá tey gerast sjúk uttan fyri vanliga arbeiðstíð hjá kommunulækna - tað er meginreglan. Her er talan um sjúku, sum skal hava røttu handfaring, viðgerð ella ráðgeving, fyri sum skjótast at fáa greiðu á støðuni og sum frægast at koma fyri seg aftur. Nógv av teimum sum ringja til Læknavaktina kunnu avgreiðast við telefonviðtalu. Er sjúkan ella støðan átrokandi og krevur skjóta handfaring, kunnu fólk eisini ringja 112, har tað verður vegleitt um, hvussu akutstøðan skal handfarast og tá serliga við atliti til skjótan fluttning til rætta fakkaførleika. At fara beinleiðis á sjúkrahús eigur altíð at vera ein møguleiki, sum stendur fólki í boði, har støðan ikki tolir drál og er at sammeta við eitt 112 uppkall. Tað er ein uppgáva hjá øllum í heilsuverkinum at kunna og leiðbeina hesum viðvíkjandi, so skipanirnar verða nýttar rætt.

Sum tað framgongur av nevndu grein í Norðlýsinum, so er fyrsta kontaktin pápin at sjúka soninum hevur við heilsuverkið ein telefonsamrøða við Klaksvíkar Sjúkrahús á veg í bili til sjúkrahúsið. Teir verða biðnir um at koma inn á med. deild. Viðkomandi sjúklingur er tá undir ábyrgd hjá Klaksvíkar Sjúkrahúsi. Um Lækni á Klaksvíkar Sjúkrahúsi eftir meting síðani heldur at sjúklingurin ikki er komin til rætta stað, so eigur hann at visiterað sjúklingin viðari sum í hesum føri til Læknavaktina. Víðari visitering verður gjørt við at ein lækni ella sjukrarøktarfrøðingur ringir til Læknavaktina um sjúklingin og á tann hátt flytir sjúklingin yvir til læknavaktina, sum so yvirtekur. Á henda hátt umgongst at sjúklingurin kennir tað sum at verður burturvístur.

Eg vildi mett, at ein fyrsta kontakt til 1870 i hesum føri hevði verið í lagi, men at ringja 112 ella sum nú sjúklingurin gjørdi fór á Klaksvíkar Sjúkrahús beinleiðis, er eisini rætt. Pápin metti at støðan var akut hjá barninum, og tann metingin er galdandi, inntil fakliga kvalifiseraðfólk (lækni/sjúkrarøktarfrøðingur) hevur mett nakað annað.

Sjúklingurin var fyrst móttikin og síðani hevði pápin fatan av at at hann var avvístur av Klaksvíkar Sjúkrahúsi. Pápin at sjúklinginum vendi sær so í telefon til læknavaktina sum í telefonviðtaluni kom fram til sanlíka diagnosa. Pápin fekk tilboð um at koma á læknavaktina við soninum, men møtti ikki. Fekk seinni eftir vaktarskiftið á Læknavaktini aftur telefonviðtalu við læknavaktina - sama diagnosa. Fekk fyriskipa viðgerð. Bleiv frískur. Støðan ongantíð fakliga mett sum hættislig. Læknavaktin hevur handlað fakliga rætt og givið eina nøktandi tænastu eftir øllum at døma.

Vil nýta høvið til at koma við nøkrum generellum viðmerkingum til samstarvi millum Læknavaktina og Klaksvíkar Sjúkrahús.

Fólk eiga at kunna venda sær beinleiðis til sjúkrahús, um tað er átrokandi neyðugt og er sambæruligt við lívshættisligar støðir. Læknavaktin forðar ikki fyri tí. Tíbetur bera fólk flest seg skjótt at tá ástendur sum í hesum føri í Klaksvík og fara beinleiðis inn á Klaksvíkar Sjúkrahús. Í allarflestu førum er støðan ikki so átrokandi. Er ivi, tá er sum sagt nærmasti møguleikin at ringja til læknavaktina, har royndir kommunulæknar svara og meta um. 1870 er ein stovnur, sum hjálpir fólki við at skilja millum nær tað er neyðugt við neyvari læknakanning og nær ikki, nær tað er neyðugt við ávísing til sjúkrahús og hvar.

Fólk í Klaksvík eru ivaleyst traditiónsbundin at sínum heimliga sjúkrahúsið og nýta mannagongdir, sum altíð hava verið í nýtslu. Nýggjar tíðir nýggjar mannagongdir. Leiðreglur eiga at vera gjørdar millum Klaksvíkar Sjúkrahús og Læknavaktina, um hvussu Læknavaktin á fakligum støði skilabest kann gera nýtslu av Klaksvíkar Sjúkrahúsi og innan hvørjar sjúklingabólkar og akutstøðir Klaksvíkar Sjúkrahús hevur førleika til at taka ímóti sjúklingum.

# Viðmerking til "Mín meining" Hjá Sofusi Johannesen

HANS JÁKUP OLSEN

Kasta ikki við gróti, tá tú sjálvur býrt í glashúsi.

Nakað soleiðis minnist eg eitt orðafelli.

Og minnist eg tað rætt, so sigur tað alt um mína kenslu eftir at hava lisið meiningina hjá Sofusi Johannesen og sæð forsíðuna á dimmalætting nr. 226, sum kom út mánakvøldið.

Har sita tveir barónar fyri Javnaðarflokkin, annar hevur aftur, sambært dimmalætting, gjørt tjóðini fyri skommum, og hin rópar "Ússaligt!" eftir mótstøðufólkunum.

Skal ikki gerð viðmerkingar til innihaldið í greinini. Skilji ikki, um so er at Jógvan Arge og Sjúrður Skaale hava tikið sær tikni av útspilling av Tjóðveldisfólki á landsfundi Javnaðarfloksins, sjálvur taki eg tað sum ein heiður.

Tað, eg her vil gera viðmerkingar til, eru tvey brot úr greinini. Fyrra brotið er har tú skrivar, at formaður javnaðarfloksins bert tosaði um vantandi álit millum hann og formann Tjóðveldisfloksins, men hevði alt gott at bera hinum landstýrisfólkunum og tingmanning Tjóðveldisfloksins, Sofus, um hetta er so, og tit veruliga meina hetta, hví endar tú so greinina við orðunum um, at øll Tjóðveldisfólk eru "Ússalig", skal verða løgið um ikki fleiri av tínum veljarum til kommunuvalið eru tjóðveldisfólk, nú vita tey so, hvat tín meining er um tey.

Hitt brotið er tað síðsta í greinini "Tjóðveldi Ússaligt".

Nú tú ert byrjaður at skriva um ússaligt, kann eg nevna nøkur onnur ting sum eru ússalig.

Tað fyrsta er, at føroya javnaðarflokkur brúkar lygnir og undanførslur fyri at sleppa burtur úr CHE samstarvinum.

Sama dag, sum fundur skuldi verða kl. 10.00 um tað, sum stóð í samgonguskjalinum um blokkstuðulin, verður boðað til tíðindafund kl 14.55, har samstarvið verður sagt upp, og roynt verður at karaktermyrða formann Tjóðveldisfloksins, við einum so pínligum málið, sum gjørdi okkum til láturs í útlondum.

Tað var ússaligt.

Føroya javnaðarflokkur kundi havt valt at vent sær til samstarvsfelagarnar og viðgingið, at "vit fáa ikki semju innanfloks um hetta málið, havt gera vit nú?"

Tað hevði verið heiðurligt.

Úm Jóannes Eidesgaard hevur reint mjøl í posanum í lásamálinum, hví torir hann so ikki at seta ein kanningarstjóra? "ússaligt"

Tit hava ein formann, sum sambært dimmalætting, aftur nú hevur gjørt tjóðini fyri skommum við eitt borðhald, tað er, um tað er so, um ikki ússaligt, so øgiliga keðiligt.

Tit hava ein formann fyri tingbólkinum, sum ferð eftir ferð ger sær fyri skommum í sinnismuni, millum annað við at kasta við lutum í tingsalinum.

Rýmir úr ferðafólkaflogfarinum í sinnismuni, sjálvt um fólk hava sitið og bíðað eftir honum.

Í staðin fyri at koma við eini umbering, kemur hann við einum álopi á Atlandsflog, tá hann ikki kom longur við tí, skrivar hann í bløðunum, "tað var ikki eg, tað var konan," Slíkt eru menn, gev konuni skuldina, so kanska eg ikki missi atkvøður, er tað ikki ússaligt?